# Fráflytingin úr Suðuroy er bara byrjanin fyri allar Føroyar

**Fólkatalið í Suðuroy er metlágt, men hendan gongdin er galdandi fyri allar Føroyar, nú fráflytingin er størri enn tilflytingin. Fólk í miðstaðarøkinum merkja hetta bara ikki, tí tað er hagar fólkið, Ið er eftir, flytur, sigur Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur**

BÚSKAPUR OG ÍBÚGVATAL

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Magni Laksáfoss ávarar um, at gongdin í Suðuroynni fer at raka allar Føroyar*

Herfyri frættist, at fólkatalið í Suðuroy er tað lægsta síðani einaferð í 1920'unum.

Sambært tølum frá Hagstovu Føroya var fólkatalið í Suðuroynni í november í fjør 4.962 fólk, sum eru 75 fólk færri í mun til við ársbyrjan 2005. Í prosentum er talan um eina minking uppá gott og væl 1,5%. Hendan minkingin er 1 % størri enn minkingin var í Føroyum sum heild teir fyrstu 11 mánaðirnar í fjør.

Í kreppuárunum fyrst í 1990unum minkaði fólkatalið í Suðuroynni heilt nógv - frá umleið 5.900 fólkum í 1980unum til færri enn 5.000 fólk í 1999 - og kom fólkatalið í ár 2000 niður á 4.973 fólk. Eftir hetta vaks fólkatalið aftur nakað, og í 2002 var fólkatalið komið uppá 5.134 fólk.

Síðan er fólkatalið støðugt minkað og er nú komið niður á 4.962. Í 1953, tá flest fólk búðu í Suðuroynni, búðu 6.314 fólk í oynni.

Minkingin í fólkatalinum er fyrst og fremst orsakað av fráflyting. 68 fólk eru flutt teir fyrstu 11 mánaðirnar av 2005. Harafturat var burðaravlopið teir fyrstu 11 mánaðirnar í fjør eisini negativt við 7. Hinvegin 52 vórðu børn fødd teir fyrstu 11 mánaðirnar, og er tað á sama støði sum í 2004.

Nógv hevur verið tosað um, hvussu til ber at venda gongdini í Suðuroy. M.a. vórðu búskaparfrøðingurin Magni Laksáfoss og samfelagsfrøðingurin Jógvan Mørkøre í fjør við í eini sonevndari vakstraravtalu fyri Suðuroynna. Magni Laksáfoss greiðir frá, at teir heldur valdu at vera við í eini økisavtalu enn eini ætlan, tí ein avtala er bindandi fyri partarnar, sum eru við, og ein ætlan verður ikki altíð til veruleika.

Tað eydnaðist at fáa allar kommunurnar í oynni at semjast um seta 250.000 krónur í hesa vakstraravtalu, men táverandi innlendismálaráðharri, Jógvan við Keldu havnaði uppskotinum og valdi ikki at seta 250.000 krónur í projektið, og tí varð ikki arbeitt meira við hesum.

Sum dømi um partar í slíkum avtalum nevnir Magni Laksáfoss Landsstýrið, kommunurnar, Fróðskaparsetrið, sum øll skuldu fingið ymsar uppgávur at hildið seg til. Ætlanin var ikki at senda tveir granskarar til Suðuroyar, sum hann tekur til, men heldur at virka sum meklarar millum partarnar, ið høvdu gjørt avtalur um, hvussu vinnulívið skuldi skipast, sigur Magni Laksáfoss.

## Ávirkar alt landið

Hann metir tó ikki, at Suðuroyggin longu er afturúrsigld.

– Gongdin í Suðuroy kann væl steðgast, men tað krevur ein vilja at gera tað, sum er neyðugt, sigur hann.

Sum er, er burðaravlopið sum nevnt neiligt, og fólk flyta av oynni, og tilflytingin er ov lítil. Harafturat eru ov fá ung konufólk í oynni, tí vinnulívið í økinum ikki megnar at bjóða fólki arbeiði.

Men sambært Magna Laksáfoss er gongdin í Suðuroy ikki nakað eindømi, tí hetta er nakað, sum er við at henda við øllum Føroyum.

Í løtuni er fráflytingin úr Føroyum nevniliga størri enn tilflytingin. Heilt nágreiniliga hevði sokallaða nettotilflytingin fyri allar Føroyar frá januar til november í fjør eitt undirskot upp á 462 fólk.

Sambært Magna Laksáfoss merkist hetta tó ikki inni á meginøkinum, tí tað er hagar, tey, ið eftir eru, flyta.

Gongdin hevur nevniliga verið tann, at vinnur sum rækjuvinnan, alivinnan, flakavinnan og aðrar vinnur ikki hava borið seg væl ella eru farnar av knóranum, og Magni Laksáfoss spyr retoriskt, hvussu nógvar vit hava fingið ístaðin?

Svarið er onga, og tí metir hann, at um verandi gongd heldur fram – og eingin kreppa kemur inn í millum – er burðaravlopið komið niður á null í Føroyum í 2037, tvs. at eins nógv børn verða fødd, sum fólk doyggja. Um ein kreppa kemur, kemur hetta sjálvandi at ávirka fráflytingina upp aftur meira, og Magni Laksáfoss vísir á, at eftir kreppur eru kvinnur ikki líka raskar at flyta heim aftur sum menninir, og hetta kemur somuleiðis at ávirka barnatalið.

Men eisini uttan kreppu, verður gongdin sum nevnt álvarsom fyri Føroyar, tí hóast burðaravlopið kemur niður á null, so broytast onnur viðurskifti ikki. Eitt nú vísa framrokningar, at um 30 ár verða 12000 pensiónistar í Føroyum í mun til 6000 í dag. Um 3000 av hesum fara at hava tørv á røktarheimsplássi, so vita vit, at tað krevst hálvtannað starvsfólk til hvørt búfólk á røktarheimi, og merkir hetta, at 5000 fólk skulu starvast á røktarheimum og ansa eftir teimum gomlu.

– Um 10-15 ár síggja vit tað, og um 30 ár eru vit inni í prosessini, sigur Magni Laksáfoss.

Hetta fer at krevja nógv av okkara vinnulívi. Sjálvandi verður støðan ein onnur, um oljuvinnan gerst veruleiki, men so er talan eisini um eina heilt nýggja støðu.

## Vinnutyssi, demografi og olja

Seinasta heyst legði Búskaparráðið fram temafrágreiðingina "Tøknilig menning og vælferð", har meirilutin í ráðnum mælti til, at føroyingar eiga at skunda sær at taka meiri tøkni í brúk, sum verður uppfunnin í útlandinum, og tillaga hana til føroysk viðurskifti.

Magni Laksáfoss, sum eisini er limur í Búskaparráðnum, var grundleggjandi ósamdur í hesi ráðgeving, og skrivaði sjálvur eitt minnilutaálit, har hann mælti til at velja sonevnd vinnutyssi og satsa uppá, granska og menna útbúgvingar innan tey tyssi, vit velja. Hetta var eisini ein partur av vakstraravtaluni, sum arbeitt var við at seta á stovn í Suðuroynni, men sum datt niðurfyri, tá Landsstýrið ikki vildi vera við.

Í hesum døgum er aðalorðaskifti í Løgtinginum, har eitt av slagorðunum í uppskotinum frá vinnumálaráðharranum er, at "gera tað, ið vit duga best".

Magni Laksáfoss hevur tó hug til at venda hesum á høvdið og siga, at tvørturímoti skulu vit vaksa út frá tí hesum.

– Hinvegin skulu vit víðka um tað, vit eru góð til, sigur hann.

Magni Laksáfoss ger nógv burtur úr at finna søgulig dømi um lond har vinnur ikki hava endurnýggjað seg, og fólkatalið er minkað, og lond,eru sum hava endurnýggjað seg, og byrjað at vaksa aftur. Dømi eru Hetland og Hebridurnar, sum minkaðu niður eina helvt eftir eini øld, og Írland, har helvtin av íbúgvunum hvurvu eftir hálvari øld. Út frá hesum ber til at síggja, hvør loysnin fyri tílík øki.

Loysnin er tí sambært Magna Laksáfoss sokallað vinnutyssi, har vinnur, ið so ella so hava ávís tilknýti, verða skipaðar. Sum dømi nevnir hann trol, trollemmar, heilivág í fiskaolju og ferðavinnu við fiskiáhugaðum ferðafólki sum møguligar vinnur við tilknýti til fiskivinnuna. Eisini nevnir hann tøkni, ið t.d. er við at spara olju, sum eina framtíðar vinnu, ið lív skuldi verið lagað.

Sum heild nevnir hann tríggjar faktorar, ið hann metir sum avgerandi fyri, um Suðuroyggin og – í framtíðini – Føroyar, skulu klára seg. Tey eru vinnutyssi, demografi - ið m.a. er burðaravlop og fólkasamanseting – og oljuprísurin, sum helst verður trífaldaður innan 2010.

## Málar ikki ræðumynd

Magni Laksáfoss undirstrikar tó, at tað ikki er uppgávan hjá honum sum búskaparfrøðingi júst at velja, hvørjar vinnur, talan skal vera um, men at ráðgeva um ein karm, har vinnutyssi kann skipast innanfyri.

Hann metir tó, at tað eru øki, har ætlanir eru lagdur um vinnutyssi, t.d. í Finnlandi og Írlandi, har búskapurin hevur klárað seg best.

– Vit halda fyri eyguni og hyggja bara í lærubøkurnar, har marknaðurin klárar alt. Men marknaðurin klárar ikki alt, og tey londini, sum hava klárað seg væl, hava stýrt vinnuni og skipað vinnutyssi.

– Fólk siga, at tað at selja kvoturnar er at selja tilverugrundarlagið úr Suðuroynni. Men trupulleikin er eisini, at man ikki útviklar vinnurnar, sigur Magni Laksáfoss.

Spurdur, um hann ikki er við til at mála eina ræðumynd við sínum forsagnum, sigur hann, at vit gloyma ov lætt, um vit ikki lesa søguna. Hann undirstrikar, at Føroyar eru ikki nakað eindømi, tí gongdin við, at fráflytingin økist, er púra vanlig og nevnir enn einaferð Hetland, Hebridurnar og Írland.

– Tað verður tungt at venda gongdini í Suðuroy, og tað hevði verið lættari at gjørt tað longu í 70'unum, men hugsunarhátturin tá var, at hví skuldi man tað, spyr Magni Laksáfoss og fýlist á handafaringina ab vinnustýringini. Hann nevnir eisini, at tað sálarliga er hart fyri eitt fólk og samfelag at reisa seg, um ein er niðri í aldudalinum.

– Hvørja ferð okkurt grenj hevur verið, hevur man bygt eitt berghol, men tað byggir einki land, sigur Magni Laksáfoss, og sipar til, hvussu undirstøðukervið eigur at verða lagað til tær vinnur, sum eru. Heldur ikki metir hann túratalið hjá Smyrli vera altavgerandi fyri vinnulív í Suðuroy.

– Fakliga er Smyril ein forðing, sum ikki má vera ov stór. Spurningurin um túratalið hjá Smyrli er sama tankagongd sum sum tunlarnir. Fyri mannin, sum brúkar meyl, kann tað gera tað sama, sigur Magni Laksáfoss.

Hann vísir á, at í fiskivinnusamfelagnum vórðu neyst og bedingar bygdar, og í fiskivinnusamfelagnum eru bryggjur og havnir bygdar, men Magni Laksáfoss spyr, hvat bygt verður til komandi vinnur.

– Vit hava 1000-1500 sjómenn í dag í mun til 3-4000 sjómenn í 50'unum, tí skipini eru meira effektiv í dag. Eru tað so havnir vit hava brúk fyri?

Hann ætlar sær ikki at heita á nýggja landsstýrismannin í innlendismálum um at veita eina nýggja játtan á fjórðingsmillión til verkavtalu í Suðuroy, hóast nýggi ráðharrin er sjálvur er suðuroyingur, tí eitt nýtt útspæl má koma frá tí partinum, sum segði nei, og tað er landsstýrismaðurin, sigur Magni Laksáfoss, ið heldur tað vera spell, at økisavtalan í Suðuroy datt niðurfyri.

Spurdur, um ein partur av orsøkunum til fráflyting eru vantandi mentanarlig tilboð, sigur Magni Laksáfoss, at hesi sjálvandi hava nógv at siga, og at tað er trupult at fáa vælútbúgvið fólk, sum hava lisið í einum stórbýi, at støðast um eingin biografur, sjónleikarhús og tílíkt er. Hinvegin vil hann vera við – við eini smílandi tilsiping um, at búskaparfrøðingar altíð bera orð fyri at vera kyniskir – at tað er tað basala um fólk mettast, ið er avgerandi fyri, um fólk ikki flyta úr einum staði.

> "*Um 30 ár verða 12000 pensiónistar í Føroyum í mun til 6000 í dag. Siga vit, at 3000 av hesum fara at krevja røktarheimspláss, so vita vit, at tað krevst hálvtannað starvsfólk til hvørt búfólk á røktarheimi, og merkir hetta, at 5000 fólk skulu starvast á røktarheimum og ansa eftir teimum gomlu"*

> "*– Vit hava 1000-1500 sjómenn í dag í mun til 3-4000 sjómenn í 50'unum, tí skipini eru meira effektiv í dag. Eru tað so havnir vit hava brúk fyri?*

> "*– Vit halda fyri eyguni og hyggja bara í lærubøkurnar, har marknaðurin klárar alt. Men marknaðurin klárar ikki alt, og tey londini, sum hava klárað seg væl, hava stýrt vinnuni og skipað vinnutyssi.*
> *– Fólk siga, at tað at selja kvoturnar er at selja tilverugrundarlagið úr Suðuroynni. Men trupulleikin er eisini, at man ikki útviklar vinnurnar*